


# Sálarfrøðingar

**Psykiatriski depilin søkir eftir trimum sálarfrøðingum fulla tíð til setan 1. februar 2011 ella skjótast gjørligt. Talan er um tvey størv til kliniskar sálarfrøðingar, ið umfata kanningar og viðgerðir av vaksnum fólki og eitt starv, ið fevnir um kanningar og viðgerðir av børnum og ungum.**

Umframt at arbeiða eftir hesum leisti fer arbeiðsøkið hjá sálarfrøðingunum at umfata kanningar og viðgerðir, samskipan, ráðgeving og undirvísing. Sálarfrøðingarnir koma eisini at verða ein partur av sálarfrøðiliga faktoyminum. Faktoymið skipar fyri innanhýsis menning av sálarfrøðingunum við m.a supervisión bæði innan- og uttanhýsis, skeiðvirksemi, gransking og toymisstimbran.

Sálarfrøðingurin innan barna- og ungdómspsykiatriina kemur eisini at verða ein partur av einum toymi, sum í løtuni er samansett av sálarfrøðingi, lækna, trimum sjúkrarøktarfrøðingum, einum skrivara og tveimum donskum konsulentum við serkunnleika innan barna- og ungdómspsykiatri. Sum partur av barna- og ungdómspsykiatriska toyminum fært tú møguleika fyri at vera við til at uppbyggja verandi tænastu, ið er eyðkend við umfatandi ambulantum virksemi. Sálarfrøðingurin skal verða partur av tí psykiatrisku, sálarfrøðiligu og sosialu útgreinanini av ávístum børnum og ungum. Umframt hetta er fokusøkið eisini at veita holla ráðgeving, ið er neyðug til barnið/tann unga, familju og onnur av týdningi, umframt til almanna- og skúlaverk, kommunulækna og aðrar myndugleikar.

**Førleikar**

- Cand. psyk. ella tilsvarandi útbúgving við autorisatión
- Arbeiðsroyndir innan psykiatriska viðgerð
- Sálarfrøðingurin til børn og ung: Fyrimunur, um tú hevur royndir at gera sálarfrøðiligar kanningar og psykiatriska útgreinan av børnum og ungum, umframt royndir innan familjusálarfrøðiligt arbeiði
- Kandidatar uttan autorisatión kunnu eisini søkja

**Persónligir eginleikar**

- Góð evni at arbeiða sjálvstøðugt og samstarva fleirfakligt
- Fakliga engasjerað/ur
- Jalig/ur í mun til nýggjar arbeiðsuppgávur
- Góðar samskiftis- og samarbeiðsførleikar
- Dirvi at vera andlit út í samfelagið

**Vit kunnu bjóða tær**

- Eitt spennandi arbeiðsøki í menning
- Eitt dynamiskt samstarv í einum breiðum fakligum toymi
- Møguleika fyri læring og førleikamenning innan áhugaøkir
- Supervisión
- Eitt mono- og tvørfakligt arbeiðsumhvørvi, sum er sermerkt av fakligheit, opinleika, álit og respekt

Lønar- og setanartreytir sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Magistarafelag Føroya

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at ringja 304500 til:
leiðandi yvirlækna Tormóð Stórá, lokal 4100, teldupostur: lstost@ls.fo ella til sálarfrøðing Tóra Petersen, lokal 4109, teldupostur: lstorpe@ls.fo

Skrivlig umsókn við CV og avriti av prógvi skal sendast til:

Landssjúkrahúsið
Lønar- og starvsfólkadeildin
FO- 100 Tórshavn

Umsóknarfreistin er 3. januar 2011 kl. 12.00

Setanarsamrøður verða væntandi í viku 2, har frumrit av prógvum skulu havast við.

*Psykiatriski depilin á Landssjúkrahúsinum er fyri alt landið, og hevur 54 seingjarpláss við umleið 250 innleggingum árliga. Harumframt er stórt ambulant - og økispsykiatriskt virksemi.. Psykiatriski depilin er í einari broytingar- og menningartíð, har arbeitt verður út frá eini visjón um at skapa "Samskipaða røkt og viðgerð", har endamálið er, at borgarar fáa eitt dygdargott røktar- og viðgerðartilboð. Til at náa hesum eru vit í holt við at menna eina toymisskipan, sum eisini leggur dent á at nýta allar førleikar á deplinum á munagóðan hátt.*




## Spyr og fá svar um útbúgvingar. Allar. Allastaðni.

Tað er tú, sum tekur endaliga avgerð um tína útbúgving, men Altjóða Skrivstovan kann vegleiða teg um tínar møguleikar innan útbúgving og um tey fíggjarligu viðurskiftini.

Altjóða Skrivstovan er nevniliga til tað sama. At vegleiða teg, sum ætlar tær at útbúgva teg í Føroyum ella uttanlands, antin tað er styttri ella longri útbúgving, verklig ella ástøðilig.

Ring, skriva ella støkk inn á gólvið og fá vegleiðing um tínar møguleikar. ASK hevur opið mánadag til fríggjadag frá kl. 10 til 15, mikudag tó til kl 18. ASK liggur við síðuna av Landsbókasavninum og er ein partur av Fróðskaparsetri Føroya.

ASK

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA

**Altjóða Skrivstovan, ASK**
J. C. Svabos gøta 14 · Postboks 272 · FO-110 Tórshavn
Tel. 322 065 · ask@ask.fo · www.ask.fo

SENDISTOVAN